## DAGSINS MEINING

# Landskassin væl frágingin?

Mytan um ein væl frágingnan landskassa verður sementerað í hesum døgum, og onkur flokkur fer enntá so langt, sum at seta seg sjálvan sum einasta garant fyri, at sami kassi ikki tømist.

Ein og hvør, sum eigur eini gomul hús veit, at um ein forsømir húsini í nógv ár, og sparir uppá viðlíkahald og annað, so verður rokningin bara tað størri, tá hon einaferð kemur. Einki at gera, kann vera tað mest kostnaðarmikla, tá av tornar.

At sitandi samgonga ikki hevur givið almanna og heilsuverkinum eina yvirháling og fingið tað uppaftur á tað støði, vit høvdu áðrenn kreppuna, merkir bert, at tað verður uppaftur tyngri hjá komandi samgongum.

Tað verður reypað ófort um, at ongantíð eru so nógvir pengar farnir í almanna og heilsuverkið. Um tað er so, so mugu vit bert staðfesta, at pengarnir ikki verða nóg væl brúktir. Um borgarin ikki merkir eitt hægri tænastustøði fyri meira pengar, so er skommin dupult hjá politiska valdinum.

Vit hava gjørt almennar íløgur sum ongantíð fyrr í hesum valskeiðnum og kemur tað at merkja gjaldføri landskassans nógv ár framm í tíðina. Tað sær ikki út til, at skattgjaldarin hevur fingið nógv afturfyri á eitt nú almanna og heilsuøkinum. Eitt er at spara av neyð, og eitt annað er at niðurprioritera við vilja.

Úrslitið av at skumpa rokningar frammanfyri sær sæst ikki fyri enn um nøkur ár. Á sama hátt, sum avgerðirnar í 80'unum skaptu kreppu í 90'unum, so skaptu avgerðir í fyrru helvt av 90'unum framgongdina, vit hava havt seinastu fáu árini.

Hvussu væl frágingin landskassin er hjá sitandi samgongu, ja tað fáa vit ikki endaligt svar uppá fyrr enn um eini 5 – 10 ár. Núverandi politikarir eru ófórir at peika afturum seg, og fortelja, hvussu avgerðir í 80'unum og 90'unum ávirka dagligdagin í dag, men siga merkiliga lítið um, hvussu avgerðirnar í dag koma at merkja dagligdagin um 10 ár.

Teknini eru ikki góð viðvíkjandi landskassanum. Útyvir blokkniðurskurðin og stóru gjaldsskyldurnar, ið vit hava fingið, so hevur landstýrið við niðurprioritering av almanna og heilsuøkinum og ikki minst skúlaverkinum skumpað eina stóra rokning frammanfyri seg, og vit vita sum er: Fyrr ella seinni skal tekjan skiftast á einum gomlum húsum. Tað ber væl til at reypa sær av at hava spart pengar í 4 ár við ikki at hava gjørt tað, hóast tað lekur í eyri og seyri, men tann sparingin gerst stokkut, tá av tornar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vælferðarsamfelagið skal varveitast

**Edva Jacobsen**
*Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Sambandsflokkurin fer støðugt at arbeiða fyri at tryggja teimum gomlu, teimum sjúku og øðrum, sum hava hjáp fyri neyðini, eins góðan stuðul og viðgerð, sum fæst í okkara grannalondum.

Fullveldissamgongan hesi seinastu 4 árini hevur havt ilt við at handfara hesi málsøki.

Hetta setir okkum í ringt ljós, tí dygdin í einum vælferðarsamfelag verður í stóran mun mett eftir, hvussu samfelagið fer um teir veiku samfelagsbólkarnar

Vel vælverðuna, vel Sambandsflokkin.

# Sjálvræði og vælferð – ikki annað men bæði!

**Eyðgunn Samuelsen**
*valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum*



Hesi síðstu 4 árini hava bert snúð seg um sjálvræði ella rættari fullveldi, ímeðan alt ið viðkemur okkara vælferð er lagt til viks. Hetta hevur fólkið merkt á sínum egna kroppi. Tey ið standa á bíðilista til eitt røktarheimspláss vita, at ikki eitt pláss er komið aftrat síðstu 4 árini. Tey gomlu ið liggja óhjálpin heima vita, at tey ikki kunnu fáa døgnrøkt, tí ongin døgnrøkt er. So nyttar lítið at fortelja hesum fólkum, at ongantíð fyrr er hent so nógv á sosiala økinum sum í hesum samgonguskeiðnum, tey vita betur !!

Henda gongdin má steðgast ! Nú mugu vit fáa fleiri røktarheimspláss !! Javnaðarflokkurin vil skapa karmar fyri at 160 nýggj røktarheimspláss verða útvega komandi 4 árini og vit vilja seta døgnrøkt á stovn beinanvegin. Hetta er ikki tóm lyfti, vit hava víst ítøkiliga á hvussu hetta kann fíggjast.

Vit ynskja eisini at fáa eina loysn á okkara ríkisrættarligu støðu sum skjótast. Hetta vilja vit gera við sjálvstýrislógini, ið er ein loysn ið savnar fólkið heldur enn at spjaða. Tað nyttar ikki at tvíhalda um loysnir ið fólkið ikki ynskir.

Vit vilja ikki , at spurningurin um sjálvræði skal ganga útyvir fólksins vælferð í 4 ár aftrat. Tí velja vit Javnaðarflokkin tann 30. Apríl.

Eydgunn@post.olivant.fo

# Søgan um ein stuðul, ið skuldi endurføðast fyri dupultan kostnað

**Thomas Arabo**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



Tá postverkið varð yvirtikið, so hendi hetta undir leiðslu av sera framsíggjnum fólki. Finnbogi Ísakson, ið tá var landsstýrismaður legði nýyvirtikna postverkinum eina við, at bløð skuldu berast út um alt landið fyri ein bíligan penga. Hetta var ein máti, at stuðla blaðútbering.

**Stuðlað liberalisering**

Sitandi samgonga gjørdi tað ikki framúr fornuftiga, at man knappliga segði, at bløð skuldu berast út á handilsligum grundarlagi. Við øðrum orðum setti Postverkið takstirnar upp til tað, ið teir mettu verða rætti prísurin við tí úrsliti, at tað gjørdist ov dýrt hjá bløðunum. Bløðini kærdu sína neyð við tí úrsliti, at ein stuðul skuldi koma til blaðútbering.

Stuðul til blaðútbering má man taka undir við, tí blaðútbering til alt landið kemur ongantíð at verða vinningsgevandi hjá nøkrum. Lættari hevði verið, um liberalistarnir, sum tá alt kemur til alt allíkavæl vilja stuðla við almennum pengum, bert lótu takstirnar hjá postverkinum verða í frið. Eisini hevði verið frægari, um núverandi samgonga ikki lækkaði tænastustøðið hjá borgaranum við at lata vera við at bera post út leygardag, sum er ein annar trupulleiki hjá bløðum.

**Størri rokning til Palliba**

Tað grovasta er, at útyvir at lata stuðul til útbering, sum ikki er skeivt, hóast gamla loysnins var betri, so innibar uppskotið hjá Djurholm eisini eitt endurgjald til Postverkið. Soleiðis fungerar fólkafloksliberalisering. Skattgjaldarin situr eftir við dupultari rokning fyri sama virksemi. Hettar vil Javnaðarflokkurin forða fyri.


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VALGREINAR

# Á tann deiliga Havn!

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins*



Tjóðveldisflokkurin hevur borið eitt kulørt blað í hvørt hús. Har stendur millum annað at lesa, at meginreglan skal vera, at almennir stovnar skulu leggjast uttanfyri miðstaðarøkið.

Eg veit ikki, hvat tjóðveldiskandidatarnir hugsa sær. Skal løgmaður aftur búgva í Sandavági, skulu aðalstýrini og almennir stovnar leggjast í hvør sína bygd, og skal Ólavsøkan kanska vera í Klaksvík annaðhvørt ár?

Tað man vera ein orsøk til, at lond hava høvuðsstaðir, og tað man vera ein orsøk til, at vit hava samtykt íløgur fyri milliardir til tess at gera samferðsluna til og úr Havnini lættari.

Hjá pørtum av samgonguni hevur tað nærmast verið ein fragd at arbeiða ímóti øllum tí, sum hevur við høvuðstaðarøkið at gera.

Øll minnast ivaleyst, tá landsstýrismaðurin í fíggjarmálum undir verkfallinum í 1999 skýrdi verkfallsfólkini fyri tey, sum: "ganga og mala ímillum húsini í Havn".

Vit minnast, hvussu barnagarðurin á landsjúkrahúsinum skuldi steðgast, tí hann fór at gagna Havnini, enntá sjálvt um sama modell kann brúkast í Klaksvík ella á Tvøroyri.

Seinasta bragdið hjá samgonguni móti Havnini var at fella uppskotini um at geva sjálvsognarstovnum, ið vilja byggja íbúðir at leiga út, sama rentustuðul og somu mvg-aftubering, sum sethúsaeigarar fáa, bara tí at eitt ítøkiligt projekt var klárt á Berjabrekku í Havn.

Á, tann ágangur, ið er móti okkara deiligu Havn.

# Kreppan og framgongdin

**Høgni Mikkelsen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



**Kreppan**

Búskaparkreppan, sum var í hæddini í fyrru helvt av 90-unum, vísti, hvussu viðkvæmt okkara einstættaða lívsgrundarlag er, tá vit ikki ansa nóg væl eftir, og tá umstøðurnar annars eru ímóti.

Hvar var Ríkisfelagsskapurin tá, spyr Tjóðveldisflokkurin. Kanska kamm nakað vera um tað. Gongdin vísti, hvussu út av lagi vánaligt samskiftið var millum føroyskar politiskar mynduleikar og ríkisstjórnina. At danskir politiskir mynduleikar settu treytir fyri at hjálpa føroyska búskapinum, kom sum ein skelkur fyri føroyingar. Í so máta kann ein siga, at hetta var ein forsmakkur uppá eina búskaparkreppu í einum føroyskum fullveldi. Avleiðingarnar fyri okkara livilíkindi, persónliga frælsi og vælferð vóru rædandi. Bankakervið og húsamarknaður rapar, ovurhonds stórt arbeiðsloysi og fólkaflyting, lønarniðurskurður, útbygging og viðlíkahald av okkara samfelag verður steðga, o.s.fr. Á mongum økjum er enn ikki vunnið innaftur tað, sum mist varð í kreppuni.

**Framgongdin**

Ótrúliga framgongdin í okkara búskapi síðani mitt í 90-unum hevur nøgvar ymiskar grundir. Føroya fólks ágrýtni og evni til at laga seg eftir nýggjum umstøðum, náttúrugivnar fortreytir við góðum fiskiskapi, altjóða fortreytir við góðum fiskaprísum og lágari rentu, heildarveiting og ikki minst innsprængingin uppá 3 milliardir, lutvíst sum lán við lágari rentu, við hjálp frá donsku stjórnini, og lutvíst sum gjald úr danska ríkiskassanum í samband við bankasemjuna. Við hesum eydnaðist at fáa bankakervið at virka, vinnulívið varð sanerað og kann nú klára seg í altjóða kapping, arbeiðsloysið er minkað niður í lítð og einki, landskassin hevur havt stórt avlop o.s.fr. Ein kann við góðari grund spyrja, hvar vit vóru í dag, um vit ikki høvdu havt ríkisfelagsskapin í kreppuárunum?

# Fremmandar íløgur í Føroyum!

**Jákup Fróði Djurhuus**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Alt gott um fremmandar íløgur í Føroyum. Men ansast má eftir, at serliga náttúrutilfeingið sum fiskirættindi og landbúnaður, sum einkultpersónar fáa fyri svartasta onki frá tí almenna, vera handla fyri milliónaupphæddir ímillum føringar og útlendingar, ímeðan inntøkan endar í skeivum lummun. Man kann eisini liggja og snorksova á hesum rættindum, um tað er tað man vil, vælgoddur av niðurbrótandi stuðulsskipanum.

Tað skapar óneyðugar køir við lúku 1, at fáa, og tað ger umsitingina av hesum rættindum til eitt slaraffenland fyri privatu løgfrøðina, og ein planøkonomiskan vavgreyt av rættarmálum og misnøgd. Leivdir frá 80´unum, heldur onkur.

Hesar hampaðu skipanir eru granskingarevni fyri fornfrøðingar.

At hugsa sær, at ein ungdómur, sum hevur hug til jarðarbrúk ella hug til at eiga skip, ikki kann, tí at virðini eru "givin burtur einaferð med alla". Tað minnir um tíðina, tá ið tað var so stuttligt at vera í ruslandi, at ongin slapp úr tí lovaða landinum.

Tað finnast skræddaraseymaðar loysnir á borðinum, sum eru klárar at seta í gildi uttan nakað hóvasták. Loysnir sum animera til framburð og skapa møguleikar fyri tann frælsa einstaklingin at virka.

Men sum við stuðulsskipanunum á sinni, so er tað tann liberali fólkaflokkurin, sum gøllheldur um hesar leivdir, og sum forðar fyri teimum modernaðu og liberalu loysnunum.

# Hugleiðing um frælsi

**Sigfríður Dam Olsen**
*valevni Javnaðarfloksins í Vágum*



Eins og fuglurin føniks tykist loysingarørslan at vakna upp úr dvala í ávísum tíðarbilum. Mótvegis teim 500 árunum hjá føniks, so er loysingarørslan nøgd við umleið 50 ár: 1906 – 1948 og 1998. Buldur og brak !! Men sum Tróndur gamli á sinni, hann suffaði við, so aftur í song - aftur at hvíla. Hvussu verður so " Hesuferð " ??

Nýggja ættarliðið í Tjóveldisflokkinum hevur gjørt upp við fortíðina. Tey hava brent brýr !! Tey, ið nú mynda flokkin, eru yvirfrelst fullveldisfólk, og tey vilja ikki kennast við tann ótrúliga framburð, sum teirra egni flokkur, saman við øðrum, hevur verið við til at skapa síðan 1948. Tað er eisini eydnast teimum at beina tey " eldru, hóvligu og semjusøkjandi brekini " av vegnum, og samstundis fækka streingirnir í ljóðførinum, og í skrivandi stund tykist bert ein einasti strongur at vera eftir: Fullveldisstrongurin. Tveir hava tey havt at leika á seinastu fýra árini, men varni búskaparstrongurin slitnaði tann minniliga, seinasta dagin í tinginum, tá løgtingsformaðurin citeraði Fleksnes: " Skal det være fest, da la det være fest ".

Í fullveldisrúsi himprast tey ikki við at misbrúka tað vakrasta orði í máli okkara, orðið FRÆLSI! Í hugaheimi tjóðveldisfólksins merkir frælsi rætt og slætt : loysing. Og tá tey citera og syngja: "Í hjørtum okkara býr frælsi, so meina tey við" :Í hjørtum okkara býr loysing.

Hjá okkum í Javnaðarflokkinum merkir orðið frælsi so nógv annað og so nógv meiri enn loysing. Fyri okkum merkir frælsi: frælsi til at kunna velja samband, frælsi til at kunna velja loysing, frælsi til at velja eina skipan, sum føroyingar flest kunna semjast um, ja frælsi til yvirhøvur at kunna velja. Og ikki minst frælsi at tala, skriva og trúgva !!

Vit í Javnaðarflokkinum taka okkum eisini tað frælsið at syngja: "Í hjørtum okkara býr frælsi", og tað bylgist innan í okkum, og vit syngja av hjarta. Og vit kunna væl sagtans syngja sangin saman við Tjóðveldisflokkinum, hóast vit tolka orðini øðrvísi. Eisini taka vit okkum tað frælsi at syngja: Hóast rákið er til høgru, eru hjørtuni…… Halló, hvar fóru tit ???

# Another brick in the wall?

**Hanna Jensen**
*Løgtingsvalevni fyri Fólkaflokkin í Eysturoy*



Føroyski skúlin verður ein hin besti í heiminum, so hvørt sum vit gerast meiri sjálvstøðug og fara at duga betur at laga alt innan skúlaverkið til føroyskar umstøður. Vit fara at síggja, hvussu stóran týdning tað hevur, at atlit vera tikin til hin einstaka. At ymiskleikin verður virdur og stimbraður. So at øll, líka mikið hvørjum tey eru sterkast í fara at blóma, hvør á sínum øki.

www.hannajensen.subnet.dk